# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

planet.fo

# Talent 2009 av bakkastokki

**Hvør hevur størsta talentið í danska kongaríkinum ? Tað fara Talent dómararnir at avgera í næstum.**

Talent 2009 fer av bakkastokki í næstum, og aftur í ár verður undankappingin í SMS í Havn.

- Tað er einki mark fyri hvør kann luttaka og ikki. Hevur onkur eitt hvørt talent, sum viðkomandi heldur er áhugavert og øðrvísi, so er møguleiki fyri at vísa síni kynstur í undankappingini, sigur Karis við Brúgv, fyriskipari í SMS.

Talent er ein sjónvarpsrøð, ið kring heimin hevur fingið stóra undirtøku, og nú byrjar sjónarvarpsrøðin aftur í Danmark. Í heyst fer DR at finna størsta talenti í danska kongaríkinum, og verður kappingin býtt yvir 12 fríggjakvøld.

Vinnararnir frá Talent 2008, Robotdreingirnir, hava veruliga sett síni spor í Danmark, og seinasta tíðin hjá teimum er farin við at framføra kring alt landið.

Vit minnast allarhelst øll føroyska Ragnar Finnsson, ið var við í Talent 2008. Hóast hann ikki gjørdist vinnari av kappingini, so er hann vorðin heldur væl kendur, og í Føroyum er eftirspurningurin eftir Ragnari stórur.

Nú verður sostatt aftur møguleiki hjá áhugaðum, at royna seg framman fyri Talent dómarunum, og verður tað í SMS 14. mars frá 14.00 – 16.00.



# Ringast at fáa bank frá sjeikinum

**Harðskapur**

Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Fyri kvinnur hevur tað nógv størri avleiðingar at fáa bank frá sjeikinum, enn at vera fyri øðrum harskapi, vísir ein nýggj kanning

Kvinnur í aldrinum 16-24 ár, sum eru fyri harðskapi frá sjeikinum, fáa nógv oftari álvarsligar skaðar, enn aðrar kvinnur. Hetta vísir ein nýggj kanning frá Statens Institut for Folkesundhed. Hetta er bæði galdandi, tá samanborið verður við kvinnur, sum eru fyri øðrum harðskapi og kvinnur, sum ongantíð hava verið fyri harðskapi, sigur danska kringvarpið DR.

Kvinnurnar, sum verða bukaðar av sjeikinum, eru oftari keddar og deprimeraðar, hava oftari høvuðpínu, ilt í maganum og fáa ikki sovið. Eisini brúka tær munandi meira av sissandi heilivági, og tær royna oftari at taka seg sjálvar av døgum.



Fólkini handan kanningina hava onki greitt svar upp á, hví hetta er so. Men tey hava kortini gjørt sær nakrar tankar um orsøkirnar.

- Enn vita vit ikki fyri vist, hví harðskapur frá sjeikinum er verri enn annar harðskapur, sigur Nina Maria Schütt, sum hevur gjørt kanningina.

Men hon roknar við, at ein orsøk er tað persónliga sambandið millum partarnar í einum parlagi. Her vísir hon á, at tað er eitt sera álvarligt álitisbrot, tá hann, sum kvinnan elskar, brádliga fer yvir um mark og fremur harðskap. Men tað kann eisini vera, at tað er ein serlig typa av kvinnum, sum fáa sær ein harðligan sjeik, heldur hon.

- Tað kann vera, at gentur, sum finna sær ein harðligan sjeik, sum heild hava tað ringari enn aðrar. Ella er tað ein kombinatión, sigur Nina Maria Schütt, sum eisini vísir á, at bert ein fjórðingur av teimum kannaðu høvdu leitað sær hjálp frá vinum, familju ella myndugleikum.

# Fyrstu stigini kunnu takast í Føroyum

**Í næstum verður skipað fyri einum Leiklistarskúla, har til ber at fáa undirvísing í leiklist, leikstjórn, at skriva til pall og scenografi.**

Hóast tað ikki er møguligt at læra til sjónleikara í Føroyum, so ber til at taka fyrstu stigini her.

MáF, Meginfelag áhugaleikara Føroya, skipar í næstum fyri einum skeiði í leiklist, leikstjórn, at skriva til pall og scenografi.

Hesin skúlin sá fyrstu ferð dagsins ljós í farna árið, og undirtøkan hevur verið so mikið góð, at MáF enn einaferð fer bjóðar undirvísingina fram.

Lærararnar, sum undirvísa á skúlanum, eru vælroyndur og kendir innan sjónleikaheimin.

Tann, sum fer at undirvísa í scenografi, var millum annað við í filminum Jeg er Dina, umframt at hon hevur staði fyri scenografinum í ymsum stórum Evropeiskum leikum.

- Hetta er eitt skeið við fýra ymsum greinum, og millum annað kunnu fólk, sum ynskja at verða sjónleikarar, verða við í undirvísingini. Hetta er eitt gott høvi at byrja sína karrieru, og nógvir av teimum amatørunum, sum byrja hjá MáF, koma seinni víðari innan fakið og enda sum professionellir sjónleikarar, siga fyrireikarar av skeiðinum.

Pláss verður fyri umleið 30 næmingum, sum búgva á Føroya Fólkaháskúla teir fýra dagarnir skeiði verður. Næmingarnir fáa skeiðsváttan, umframt møguleika at halda fram við lestrinum í 2010.